## Eingin tekur Barca

Lionel Messi (myndin) undirstrikaði sína støðu sum heimsins besti í ár, tá hann avgjørdi HM-kappingina fyri feløg. Í finaluni móti argentinska Estudiantes leygarkvøldið var Barcelona tó í trupulleikum, eftir at Mauro Boselli hevði stútað suðuramerikansku meistararnar framum. Bara ein minutt fyri leiklok eydnaðist innskifta Pedro Rodriguez at stúta Barca upp á javnt, og so traðkaði besti spælarin í Europa – og helst skjótt eisini í heiminum – í karakter, tá hann eftir 110 minuttum við bringuni skoraði til 2-1. Barcelona hevur í ár vunnið alt, sum vinnast kann: Sponsku steypakappingina, spanska meistaraheitið, Champions League, spanska Super-Cup, europiska Super-Cup og nú eisini HM-heitið fyri fótbóltsfeløg.



## Tvíkynjað endurgjald

Suðurafrikanski rennarin, Caster Semenya, krevur nú yvir 600 milliónir krónur í endurgjaldi frá altjóða sambandinum fyri frælsan ítrótt, IAAF, og smáar 100 milliónir krónur frá suðurafrikanska sambandinum fyri frælsan ítrótt, ASA. Semanya, sum rennur 800 metra teinin hjá kvinnum, vann gull í heimsmeistarakappingini í summar, men ivi varð sáddur um kyn hennara, so hon mátti kannast. Eftir hetta almannakunngjørdi IAAF, at Semenya var tvíkynjað. Suðurafrikanski rennarin hevur fingið amerikanska sakføraran, Greg Nott, at hjálpa sær, og hann hevur roknað seg fram til, at tey bæði sambondini skulu stevnast eftir tilsamans 716 milliónum krónum.

# Sparky fekk sparkið

**Pengarnir fáa alt størri vald í dagsins fótbóltsheimi, men teir kunnu ikki keypa alt. Heldur ikki eina oddastøðu í Premier League, og tað mátti Mark Hughes rinda prísin fyri**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk



Sum spælarin var Mark Hughes ein tann treiskasti, óttaleysi áleyparin, enskur fótbóltur hevur sæð. Leygardagin veitraði hann fyri seinastu ferð áskoðarunum hjá Manchester City farvæl
Mynd: Polfoto/AP

Tað sá annars so lovandi út, tá Premier League bara var nøkur frá umfør gomul. Manchester City vann og vann, og aloftast megnaði mótstøðan als ikki at skora. 4-3 tapið móti grannunum úr Manchester United og mentorinum hjá Mark Hughes, Sir Alex Ferguson, gjørdist tó á onkran hátt vendipunktið hjá Manchester City.

Hóast teir vunnu næsta dystin, sum var móti West Ham, so varð hetta fylgt upp av sjey javnleikum á rað, og tað kostar. Tað eydnaðist at basa Chelsea 2-1, men hetta varð bara tann næsti sigurin í 11 dystum, og so mistu eigararnir tolið. Abu Dhabi United gav Sparky sparkið, og í hansara stað verður Roberto Mancini settur í starvið.

### Brúkt milliardir

Í bakspeglinum er spurningurin helst eisini, um Hughes var tann rætti maðurin at standa á odda fyri milliardaætlanunum í Manchester City.

Upprunaliga var eingin, sum tosaði um Hughes, tá Thaksin Shinawatra keypti sær meirilutan í felagnum. Tá var svenski Sven-Göran Eriksson maðurin, sum varð settur í sessin, men tann 2. juni í 2008 varð Hughes settur í starvið fyri sekkjaða svian.

Sum spælari var hann treiskur og óttaleysur, og hóast venjararoyndirnar ikki vóru hjá nøkrum av meira glamourøsu feløgunum, so fór Sparky undir starvið við góðum treysti.

Fortreytirnar fyri góðum úrslitum gjørdust ikki verri, tá enn eitt eigaraskifti rakti felagið. Undir Shinawatra hevði City stórar ætlanir, men tá Abu Dhabi United keypti felagið, gjørdist felagið samstundis heimsins ríkasta.

Vantandi pláss í Champions League merkti tó, at tað illa bar til at draga veruligu megastjørnurnar til felagið, men peningaupphæddirnar hava kortini verið stórar. Ikki minst við Robinho, sum varð keypur fyri enska metupphædd, 32,5 milliónir pund, frá Real Madrid. Aðrir spælarar, sum eru komnir til felagið, meðan Hughes hevur staðið við stýrisvølin, eru Jo, Tal Beb-Haim, Vincent Kompany, Shaun Wright-Philips, Pablo Zabaleta, Wayne Bridge, Craig Bellamy, Shay Given, Nigel de Jong, Gareth Barry, Roque Santa Cruz, Carlos Tevez, Emmanuel Adebayor og Kolo Toure. Og sum føroyskt ískoyti kann eisini nevnast Gunnar Nielsen, ið kom úr Blackburn, har Hughes áður hevði virkað sum venjari.

Fyrsta kappingarárið gekst væl á heimavølli, men á útivølli bar einki til, og tí mátti felagið taka til takkar við einum tíggjunda plássi. Eisini spældi felagið seg í fjórðingsfinaluna í UEFA-Cup, eftir at hava sligið EB/Streym úr kappingini á vegnum.

Mongu keypini – ikki minst Adebayor – tóktust hava sína positivu ávirkan, tá kappingin byrjaði, men oddasesurin er í løtuni broyttur til eitt pláss beint undir toppinum, og tað er minni enn tað, sum vónirnar eru til.

### Visti av ongum

Sjálvur var Hughes vónbrotin, tá hann fekk boðini leygarkvøldið, eftir at hann í seinasta dystinum sum venjari hjá City hevði leitt liðið til ein 4-3 sigur á Sunderland.

– Sjálvandi eri eg vónbrotin, nú eg ikki fái møguleika at gera arbeiðið liðugt, soleiðis sum eg hevði sett mær fyri. Undan kappingarárinum tosaði eg við eigararnar, og vit vóru samdir um, at eitt sætta pláss ella so var nøktandi hjá felagnum. Og vit vóru væl og virðiliga innan fyri mark eftir hesum mátinum, segði Hughes við ensku miðlarnar leygarkvøldið.

Men eftir øllum at døma hava úrslitini ikki verið nóg góð. Um Mancini kann broyta hetta, kann bara tíðin vísa. Menn fyrrverandi Inter-venjarin hevur sum venjari eitt størri navn, og tí kann hann kanska verða maðurin, sum togar seinastu stóru stjørnunar til City of Manchester Stadium.

Í so máta er tað neyvan av tilvild, at venjaraskiftið hendi, beint áðrenn flytingarvindeygað læt upp. Og við pengunum, sum enn eru nógvir hjá eigarunum, skal tað vera løgið, um ikki onkur stórur spælarahandil verður at síggja í januar mánaði.

## Úrslit í Premier League

| | |
|---|---|
| Portsmouth-Liverpool | 2-0 |
| Aston Villa-Stoke | 1-0 |
| Blackburn-Tottenham | 0-2 |
| Fulham-Manchester United | 3-0 |
| Manchester City-Sunderland | 4-3 |
| Arsenal-Hull | 3-0 |
| Wolves-Burnley | 2-0 |
| Everton-Birmingham | 1-1 |
| West Ham-Chelsea | 1-1 |
| Wigan-Bolton | úts. |

**Premier League**

| Nr | Lið | Dystir | V | - | J | - | T | Vunnin mál | Tapt mál | Málmunur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 18 | 13 | - | 2 | - | 3 | 43 | 15 | 28 | 41 |
| 2 | Man Utd. | 18 | 12 | - | 1 | - | 5 | 37 | 17 | 20 | 37 |
| 3 | Arsenal | 17 | 11 | - | 2 | - | 4 | 44 | 20 | 24 | 35 |
| 4 | Aston Villa | 18 | 10 | - | 5 | - | 3 | 29 | 14 | 15 | 35 |
| 5 | Tottenham | 18 | 10 | - | 3 | - | 5 | 40 | 22 | 18 | 33 |
| 6 | Man City | 17 | 7 | - | 8 | - | 2 | 33 | 27 | 6 | 29 |
| 7 | Birmingham | 18 | 8 | - | 4 | - | 6 | 19 | 18 | 1 | 28 |
| 8 | Liverpool | 18 | 8 | - | 3 | - | 7 | 34 | 25 | 9 | 27 |
| 9 | Fulham | 17 | 7 | - | 5 | - | 5 | 23 | 17 | 6 | 26 |
| 10 | Sunderland | 18 | 6 | - | 3 | - | 9 | 25 | 28 | -3 | 21 |
| 11 | Stoke | 17 | 5 | - | 6 | - | 6 | 15 | 20 | -5 | 21 |
| 12 | Wolves | 18 | 5 | - | 4 | - | 9 | 17 | 31 | -14 | 19 |
| 13 | Blackburn | 18 | 5 | - | 4 | - | 9 | 17 | 32 | -15 | 19 |
| 14 | Burnley | 18 | 5 | - | 4 | - | 9 | 21 | 37 | -16 | 19 |
| 15 | Everton | 17 | 4 | - | 6 | - | 7 | 23 | 31 | -8 | 18 |
| 16 | Wigan | 17 | 5 | - | 3 | - | 9 | 20 | 38 | -18 | 18 |
| 17 | Hull | 18 | 4 | - | 5 | - | 9 | 17 | 37 | -20 | 17 |
| 18 | Bolton | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 23 | 33 | -10 | 16 |
| 19 | West Ham | 18 | 3 | - | 6 | - | 9 | 26 | 35 | -9 | 15 |
| 20 | Portsmouth | 18 | 4 | - | 2 | - | 12 | 17 | 26 | -9 | 14 |